## Ein oljugrunn afturat



Norski stórtingslimurin Ivar Kristiansen, sum umboðar Høgraflokkin, vil hava Stórtingið at stovna ein serligan oljugrunn fyri økini Lofoten og Vesterålen, nú ætlanir eru um at fara undir oljuvinnu har. Eftir uppskotinum skal grunnurin hava fimm milliardir krónur í stovnsfæi, og uppskotið er sostatt meinlíkt einum tilsvarandi uppskoti, sum ein annar tinglimur kom við í 2004, skrivar NTB. Ivar Kristiansen sigur við tíðindastovuna, at tann serligi oljugrunurin skal brúkast til at fíggja samferðslukervið og aðrar útbyggingar í Vesterålen og Lofoten, eins og hann skal menna tað lokala vinnmulívið.

## Nærkast sjey milliardum

Eina ferð næsta ár fer fólkatalið á jørðini upp um sjey milliardir. Í 1999 fór heimsins fólkatal upp um seks milliardir, og í dag liggur talið um 6,8 milliardir. Tað eru serliga tey í menningarlondunum, sum fjølgast, og tann gongdin sæst eisini sjónliga í framrokningum, sum ST hevur latið gera. Sum dømi verður víst á, at í dag búgva 31 milliónir fólk í Kanada og 34 milliónir í Uganda. Men í 2050 verða 42 milliónir fólk í Kanada og 96 milliónir í Uganda. India verður tað fjølmentasta landið í 2050 við 1,8 milliard íbúgvum. Í Kina verður talið 1,4 milliard. Tá verða amerikanararnir 439 milliónir í tali.

# Stýrisskipanarnevndin mannað

**Løgtingið hevur valt nevndina, sum skal gera uppskot um Stjórnarskipan Føroya. Allir flokkar eru umboðaðir í nevndini, sum skal lata Løgtinginum uppskotið innan 1. november**



*meini, at vit eiga mynd av sjálvum álitinum til Stjórnarskipan Føroya*

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Teir stóru flokkarnir hava tvey umboð hvør, og teir báðir minnu hava hvør sítt umboð.

Fyri Tjóðveldi eru Høgni Hoydal og Sjúrður Skaale í nevndini við Torbirni Jacobsen og Bjørt Samuelsen sum varalimum.

Sambandsumboðini eru Helgi Abrahamsen og Jaspur Vang, og teirra varamenn eru Marius Dam og Bjørn Kalsø.

Fólkaflokkurin hevur valt Poul Michelsen og Jógvan á Lakjuni í nevndina, og varalimir teirra eru Heðin Zachariasen og Annfinn Kalsberg.

Javnaðarumboðini í nevndini eru John Johannesen og Hans Pauli Srtøm, og varalimir teirra eru Andreas Petersen og Katrin Dahl Jacobsen.

Fyri Miðflokkin er Jenis av Rana í nevndini og Karsten Hansen varalimur, og fyri Sjálvstýrisflokkin er Kári á Rógvi í nevndini við Kára P. Højgaard sum varalimi.

### Bleiv ikki liðugt

Stjórnarskipanarnevndin er vald eftir uppskoti til samtyktar, sum tíggju løgtingsmenn úr øllum flokkum løgdu fram ólavsøkudag. Har stóð, at uppskotið til Stjórnarskipan Føroya skal gerast við støði í áliti um Stjórnarskipan Føroya, sum varð handað løgmanni hin 18. desember 2006.

Uppskotið skal hava ásetingar um stýrisskipan, valdsbýti og grundleggjandi rættindi og skyldur borgaranna. Somuleiðis skal uppskotið hava ásetingar um fólkaatkvøðu um uppskotið, áðrenn Løgtingið tekur endaliga støðu til tað.

Løgtingið setti í november í fjør eina nevnd at koma við uppskotið um Stjórnarskipan Føroya við støði í álitinum frá 2006. Nevndin hevði 13 fundir og kom nakað áleiðis, men hon bleiv ikki liðug við arbeiði sítt, og tí er hon nú mannað av nýggjum.

Nevndin, sum Løgtingið valdi í gjár, skal leggja uppskot um Stjórnarskipan Føroya fyri Løgtingið innan 1. november í ár.



*Søren Espersen er Grønlands-framsøgumaður hjá Danska Fólkaflokkinum*

*Mynd: Fólkatingið*

# Tvætl at biðja grønlandsbørnini um umbering

**Fær Danski Fólkaflokkurin tað avgerandi orðið, fáa tey grønlendsku børnini, sum vórðu send til Danmarkar í fimmtiárunum, onga umbering frá tí almenna Danmark**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

-Vit halda tað vera eitt sera gott hugskot, at ein ella tveir søgufrøðingar verða settir til at kanna málið um tey grønlendsku børnini, og vit eru eisini sinnaðir at finna pengar til kanningina. Men vit fara ikki at taka undir við nakrari almennari kanning, og vit fara heldur ikki at taka undir við nakrari almennari umbering.

Tað sigur Søren Espersen, fólkatingsmaður og Grønlands-framsøgumaður hjá Danska Fólkaflokkinum, við danska kringvarpið. Hann sigur, at flokkurin hevur einki ímóti at kanna málið um tey 22 børnini, sum vórðu send til Danmarkar sum ein roynd í 1951.Men sama hvat úrslitið av kanningini verður, so fer Danski Fólkaflokkurin ikki at taka undir við nakrari umbering.

-Prinsipielt haldi eg, at tað er nakað tvætl at biðja um umbering fyri nakað, sum hendi í fortíðini. Vit kunnu ikki loyva okkum at døma farin ættarlið eftir tí, sum er galdandi í dag, men tað gera vit tíverri alt ov ofta. Eg ivist ikki í, at tey, sum stóðu aftan fyri hesa verkætlanina, gjørdu tað við bestu ætlan. Sjálvandi kann forsætisráðharrin gera tað, sum hann heldur vera rætt, men eg haldi, at tað er tvætl at biðja um umbering í hesum føri, sigur Søren Espersen við DR.

# Góður bramafiskur

**Bramafiskur hevur góðan prís á evropeiska marknaðinum**



FISKASLAG
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í greinini í gjár um á okkara leiðum skrivaðu vit lítið kenda bramafiskin, sum ikki hevur verið veiddur her í Føroyum, tí so lítið hevur verið til av honum.

Men harfyri er skeivt at siga, at tað ikki loysir seg at fiska bramafisk.

- So er ikki, tvørturímóti, tí fiskurin smakkar væl og hevur prís á marknaðunum í Europa.

So, um ein fiskimaður undir Føroyum skuldi troffið við nakrar bramafiskar, so er at ísa teir og fáa teir á fiskamarknaðin, sigur Rógvi Mouritsen á Havstovuni.